Jólakalendarin '07

Tríggir seinastu vinnararnir í Barnakappingini

Svar og vinnari av kappingini mikudagin 19. desember:

1. Heródes ætlaði at drepa barnið
2. Inntil eingilin segði Jósefi til
3. Eingil Harrans vísti seg fyri Jósefi í dreymi og bað hann fara heimaftur

Helma Maria Tróndheim
Eggjarvegur 15
520 Leirvík

Svar og vinnari av kappingini hósdagin 20. desember:

1. Í Nazaret
2. Símeon
3. Hann varð drivin av Andanum

Ragnar Gaard
Heygatún 1
410 Kollafjørður

Svar og vinnari av kappingini fríggjadagin 21. desember:

1. Tók Jesus í favn og signaði tey
2. Hon tænti Gudi við føstu og bøn nátt og dag
3. Jóhannes doypari

Fríðgerð Finnsdóttir
765 Svínoy

FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
The Faroe Islands Fisheries Inspection

AVLOYSARASTARV SUM 1. MEISTARI TIL FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

Eitt avloysarastarv sum 1. meistari við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst, at seta sum skjótast.
Avloysarastarvið kemur at vara til 24. mai 2008.

Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávur:
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Skipa fyri og luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúmunum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Skipa fyri viðlíkahaldi sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

Førleikakrøv:
- Vinnubræv sum Skipsmaskinmeistari á 2. stigi (STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer).
- Fyrimunur við 3 ára maskinmeistaraútbúgving
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Leiðsluroyndir
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

Setanartreytir:
Fyri avloysarastarv galda treytirnar í avtalu millum Figgjarmálaráðið og Maskinmeistarfelagið.
Starvið er lønt í 31. lønarflokki í lønartalvuni hjá Tænastumannafelagnum. Tænastustaðurin er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 1.meistari.

Umsóknir:
Skrivlig umsókn við: CV, avrit av prógvum fyri førleikakrøv og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 11. januar 2008 kl. 14.00.

Umsóknirnar skulu sendast til:

Fiskiveiðieftirlitið
Postsmoga 347
110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Jóannes Heimustovu. Henda lýsing er eisini á heimasíðuni www.fisk.fo

www.fisk.fo